### Fyri 50 árum síðani:

# Tá Dalai Lama flýddi úr Tibet

**Í hesum døgum eru 50 ár liðin, síðani Dalai Lama flýddi úr heimlandi sínum, Tibet til India**

## Fimmti ára minni



Heri Simonsen
heri@sosialurin.fo

Í oktober 1950 tóku herdeildirnar hjá Kina Tibet. Hetta var ikki gjørt við samtykki frá tí tibetanska fólkinum, men kortini royndi landsins andligi og politiski leiðari, tann tá bert 15 ára gamli Dalai Lama, at arbeiða fyri einari friðarligari loysn fyri tað tibetanska fólkið. Fyrstu árini aftan á hertøkuna gjørdi Dalai Lama sítt ítarsta fyri at halda seg væl við kinversku stjórnina, í vónini um, at kinversku kommunistarnir fóru at virða siðvanda liviháttin hjá tibetanarunum og lata tey sleppa at praktisera sína aldargomlu buddhistisku trúgv.

### Kúgaðu Tibet

Men hóast væl meintu royndirnar hjá Dalai Lama, so rínur einki við hjá kinverjum. So skjótt sum teir hava hertikið Tibet byrja teir at brúka valdsgerðir og undirkúgan, fyri at fáa tibetanarnar at taka við maoistisku læruni. Samstundis sum teir í almennum samráðingum við Dalai Lama lova, at einki skal verða broytt í Tibet. Men við tíðini trýstir kinverska stjórnin Dalai Lama alsamt meiri til at tæna kinverskum áhugamálum.

Við endan av 1950-unum bað kinverski leiðarin, Mao, Dalai Lama um at sláa niður á mótstøðurørsluna, sum var vaksin fram í ymisku tibetansku ættarbólkunum. Tá Dalai Lama fær hesi harraboðini, gerst tað honum greitt, at hansara samstarv við Mao-Kina fer ikki at føra til frið í Tibet, men at landið verður púra undirgivið kommunismuni.

### Møtti ikki

Tá Dalai Lama tann 10. mars í 1959 noktar at taka við einari innbjóðing til ein fund í tí kinversku høvuðsskrivstovuni í tibetanska høvuðsstaðnum, Lhasa, byrjar stríðið veruliga. Tey kinesisku embætisfólkini eru rasandi, og túsindatals tibetanar savnast framman fyri borgini hjá Dalai Lama, sum nevndist “Norbulingka”.



Tibetanarnir gjørdu hetta bæði fyri at forða Dalai Lama at broyta hugsan, og at forða kinverjum í at leypa á borgina og handtaka Dalai Lama.

Sjey dagar seinni, 17. mars í 1959 hótta kinverjar at bumba Norbulingka-borgina. Dundurið frá mortaragranatum, og tíðindini um, at fleiri kinverskar herdeildir eru á veg til Lhasa, sannførir Dalai Lama um, at kinverjar liggja honum eftir lívinum.

Dalai Lama sær bara eina loysn, um hann skal bjarga sær sjálvum, síni nærmastu og Tibet. Hann er noyddur at flýggja til India.

### Í hermannabúna

Aftan á eina vitjan í templinum fer Dalai Lama til kamar sítt, fyri at skifta til onnur klæðir. Hann tekur munkaskjúrtina av, og fyri fyrstu ferð í lívi sínum letur hann seg í vanligar brøkur og í langan svartan hermannafrakka. Hann leggur eina byrsu yvir aðra økslina, og yvir hina økslina leggur eina samanrullaða “Thangka”.

Thangka er dekoreraður bønarmálningar, sum altíð er við á ferðini hjá tibetanskum munkum.

Thangka-málningurin, Dalai Lama tekur við sær, er av einum serligum slagi, og er umleið 500 ára gamal.

Klokkan 10 um kvøldið fer Dalai Lama av borgini hjá sær. Tveir vaktarmenn føra hann gjøgnum eina myrka viðarlund. Komnir til portrið standa trý starvsfólk hjá Dalai Lama og bíða eftir honum.

Uttan fyri borgina eru túsindtals tibetanarar, sum rópa rakstaróp í tí ísakøldu náttini. Saman við hjálparmonnunum roynir Dalai Lama at koma burtur frá stóra fólkamongdini. Dalai Lama veit, at kinverskir njósnarar eru millum fólkini, sum standa uttan fyri borgina. Men eingin leggur merki til hvør hann er.

### Kenna hann ikki aftur

Komnir út á vegin til ánna, sum nevnist Kyichu, vera Dalai Lama og hjálparmennirnir steðgaðir av einum lítlum flokki, sum siga seg hava hoyrt, at Dalai Lama ætlar at flýggja. Dalai Lama sendir ein av sínum hjálparmonnum avstað fyri at práta við tann lítla flokkin. Ímeðan roynir Dalai Lama at halda eina ávísa frástøðu, og roynir hann samstundis at líkjast einum veruligum hermanni.

Tá ein løta er farin, sleppa teir at halda fram á ferð sínari. Ein tíma seinni fara teir yvirum Kyichu-ánna. Hinumegin bíða mamman, systurin og lítlibeiggin hjá Dalai Lama. Tey hava eisini megnað at flýggja frá Norbulingka, klødd sum stammufólk.

Fleiri av stjórnarlimunum og andligu leiðarunum hjá honum eru eisini smuglaðir út, goymdir undir presendingum í tungum lastbilum.

Dalai Lama gerst ovurfegin, tá hann sær ein bólk við 30 vápnaðum monnum frá Khampa-ættarbólkinum, sum er kjarnin í mótstøðurørsluni hjá Tibet. Khampa-mennirnir hava hestar við sær. Nú ræður um hjá Dalai Lama at koma sær burtur frá Lhasa, og teir herja á fjøllini.

### Strævin ferð

Tað er ikki smávegis strævin ferð, sum bíðar Dalai Lama og fylgi hansara. Talan er um illa framkomandi fjallalendi við nógvum kava, og hitastigum, sum liggja undir frostmarkinum.

Uttan stórvegis hvíld vera hestarnir saðlaðir, og teir staðkendu mótstøðumennirnir føra fylgið í ein landnyrðing. Ferðin gongur gjøgnum høga fjallalendið, Che-La.

Fyrsti partur av vegnum er bara ein smøl og steinut rás. Í náttarmyrkrinum stríðast hestar, berarar og Dalai Lama seg fram.

Klokkan trý um morgunin ger fylgið sær eitt náttarból, men nakrar fáar tímar seinni, vera hestarnir aftur saðlaðir. Dalai Lama og hini í fylginum mugu bæði klintra á øllum fýra, og aðrar tíðir mugu teir skreiða eftir sandinum.

Seint seinnapartin hevur fylgið lagt Che-La aftur um seg, og øll fegnast um, at tey eru komin langt burtur frá Lhasa.

Fylgið fer eisini yvirum Tsang Po-ánna við einari lítlari ferju. Tá tann lítla ferjan er komin fram, stendur ein stór fólkamongd, sum er komin saman fyri at ynska Dalai Lama vælkomnum. Nógvir av teimum eru guerillahermenn og krígsmenn, sum eru lættir at kenna aftur við sínum hvítu